# Miðstøðin fyri minnisveik í Havn
# søkir 2 starvsfólk

Miðstøðin fyri minnisveik, er ein royndarverkætlan, sum Alzheimerfelagið hevur tikið stig til. Verkætlanin verður fíggjað av Almannamálaráðnum og Tórshavnar kommunu.

Miðstøðin fevnir m.a. um eitt dagtilhald fyri minnisveik, ráðgeving til persónar við demens og teirra avvarðandi, og um vikuskiftini verður av og á café. Miðstøðin hevur leigað eini vælhóskandi hús til endamálið miðbýnum.

Fyrst verður farið undir dagtilhaldið, har 8 fólk kunnu vera samstundis. Dagtilhaldið er ætlað heimabúgvandi persónum við demens í dagtímunum vanligar yrkadagar. Trý fara at starvast í dagtilhaldinum. Miðstøðin fer at leggja seg eftir at arbeiða eftir nýggjastu umsorgarteorium, sum stimbrar tann sjúka psykososialt. Henda uppgávan krevur starvsfólk, sum hava áhuga at arbeiða við minnisveikum fólkum.

**Søkt verður eftir tveimum starvsfólkum** til setan 1. september 2004 ella eftir avtalu. Størvini eru tíðaravmarkaði til 30. juni 2006, samsvarandi játtanini til royndarverkætlanina.

**Førleikakrøv til umsøkjaran:**
- hug og hegni at vera um persónar við demens
- ávísa vitan innan demens
- støðugt at vilja dagføra kunnleikan innan demensøkið
- skal vera sjálvstøðugur og kreativur
- góð samstarvsevni
- hava tol og empati

Til størvini krevst útbúgving sum sjúkrarøktarfrøðingur, ergoterapeutur, heilsuhjálpari/atstøðingur, pedagogur ella onnur líknandi útbúgving. Tað er ein fyrimunur at hava eftirútbúgving sum demenssamskipari. Dentur verður lagdur á starvsroyndir.

**Vit bjóða:**
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv, har tú fært møguleika frá byrjan, at seta dám á stovnin
- eitt starv har tú ert við til at virka fyri at røkka settu málum
- møguleika fyri menniskjaligari og fakligari menning

Talan er um tvey fulltíðarstørv við arbeiðstíð vanligar yrkadagar í dagtímunum. Niðursett tíð kann møguliga koma uppá tal.

**Setunarviðurskifti:**
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Ernu Háberg, projektleiðara tlf. 228004 ella 316350

Umsóknarfreistin er **leygardagin 14. august 2004.**

Skrivlig umsókn saman við viðmælum, royndum og upplýsing um útbúgving v.m. skulu sendast til:

**Alzheimerfelagið**
**Tórsbyrgi 16**
**100 Tórshavn**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# Grunnurin

til frama fyri samstarvi og fatan millum
Aberdeen og Tórshavn

Grunnurin

Býarstýrini í hesum býum hava sett pening í grunnin, sum er uppá kr. 200.000. Endamálið er at veita fíggjarligan stuðul til tiltøk ella annað, ið kann fremja og menna samstarvið og fatanina millum hesar kommunur og borgarar teirra.

Nú verður aftur møguleiki at søkja stuðul úr felagsgrunninum Aberdeen - Tórshavn.

Ætlanin er í septembermánað at taka avgerð um veitan av studningi.

Tórshavnar býráð heitir tí á einstaklingar, felög o.o., ið halda seg koma undir treytirnar fyri stuðli, um at senda býráðnum umsóknarblað við frágreiðing um tiltakið, nær tað verður og um mettan kostnað. Umsóknarblaðið fæst í Snarskivuni ella á heimasíðuni hjá kommununi.

Meiri fæst at vita um treytir við at venda sær til Jens M. Poulsen, kommunustjóra, ella Marjun Lindenskov, skrivara, á tlf. 30 20 10.

Umsókn, merkt »AberdeenTórshavn« eigur at vera Tórshavnar kommunu, postsmoygu 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 16. august 2004.

www.torshavn.fo

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
Hoydalar, FO-188 Hoyvík
*Telefon 2298 312973 - Telefax + 298 318624*

# Hjálparfólk til kantinuna

Søkt verður eftir 2 hjálparfólkum til kantinuna. Vit leggja dent á, at tey, ið sett verða, eru røsk, álítandi og nærløgd í sínum arbeiði. Tað er ein fyrimunur, um tú ert von/vanur við køksarbeiði.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Fyri annað starvið er arbeiðstíðin hvønn gerandisdag frá kl. 8.00 til 15.00 teir dagar, tá skúlagongd er.
Fyri hitt starvið er arbeiðstíðin somu dagar kl. 9.00 til 13.00.

Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at ringja til rektaran á tlf. 284613.

Skrivligar umsóknir við møguligum viðmælum skulu vera rektaranum í hendi í seinasta lagi mikudagin 11. august 2004.

Best er, um tey settu kunnu byrja at arbeiða 16. august, annars skjótast gjørligt aftaná hetta, ikki seinni enn 1. september 2004.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 207, P/F S.M.S., 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar:
22.06.2004.
Strikan av hjánavni: P/F Hornið
Nýggj Hjánøvn: P/F Hornið í SMS (P/F S.M.S.) og P/F Perlan í SMS (P/F S.M.S.)

Felagið er samanlagt við skrásetingar-nr. P/F 3359, P/F Perlan í SMS sum samstundis verður strikað.

Skráseting Føroya tann 3. august 2004

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2114, P/F M. J. Saltsøla, 100 Tórshavn

Nevnd:
Innkomin í nevndina: Magni Johannesen, Skemmingsgøta 24, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 3. august 2004

Kristin Balle

---

Sosialurin
Sosialurin i

# SPEEDBÁTUR

**BAYLINER 2052 BR** **TIL SØLU**



Innbygdur motorur 4,3L
Kr. 97.000,-

Fá sleipivogn við
fyri kr. 20.000,-

273703

GEVIÐ BLÓÐ



# TILBOÐ

so leingi vøra er á goymslu



**GOSBAÐ**
- Við 10 jetdysum og frontpanel. Uttan armatur
- Veitingartíð 4-6 vikur

vanligur prísur 11.498,-

**BERT 9.598,-**
**spar 1.900,-**



**BAÐIRÚMSMØBIL**
- Hvítt, 88 cm
- Undirskáp H:55xB:60,5xD:31,5 v/ 2 hurðum, hvítt vask, spegl og baldakin
- Háskáp H:172xB:27,5xD:28 v/ 2 hurðum
- Uttan blandingsbattarí

**BERT 2.298,-**



**BAÐIRÚMSMØBIL**
- Undirskáp H:62xB:90xD:34 v/ vaski í høgru síðu, skuffa og 3 hurðar við handtøkum
- Yvirskáp við glashurð og 2 glashillum, spegl, hill og ljós
- Uttan blandingsbattarí

**BERT 3.498,-**

**VALNØT BORÐPLÁTA**
- Massiv borðplága. 62x302 cm



**BERT 1.198,-**

damor
KVÍGGJARTÚN 3 • ARGIR • TEL 315415 • FAX 319001




# Koyrikort?

Nýggj teoriskeið byrja
mánadagin 9. august
kl. 17.30 til persónbil
kl. 19.30 til lastbil, trailara og buss

FØRARASETRIÐ
K O Y R I S K Ú L I

Stanley A. Olsen
koyrilærari
tel 21 10 99 • 21 10 96

John A. Christiansen
koyrilærari
tel 21 47 75

Jekaragøta 10 • Tórshavn

# Leiðari
## til dagrøktarskipanirnar í Hvannasundi og á Viðareiði

Hvannasunds- og Viðareiðis Kommuna søkja eftir leiðara fulla tíð til dagrøktarskipanirnar í báðum kommununum.

Umsøkjarin skal hava námsfrøðisliga útbúgving sambært løgtingslóg nr. 65 frá 10.05.2000.

Starvið verður sett frá 1. oktober 2004.

Løn sambært sáttmála ímillum Pedagogfelag Føroya og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum viðmælum vera at senda til:

**Hvannasunds Kommunu**
**FO-740 Hvannasund**

í seinasta lagi 20. august 2004.

Meira fæst at vita frá núverandi leiðarum:

| Dagrøktin í Hvannasundi | Dagrøktin á Viðareiði |
|---|---|
| Gunvør Eliasen, leiðari | Marjun Samson, leiðari |
| Tlf. +298 226360 | Tlf. +298 211341 |

| **Hvannasunds Kommuna** | **Viðareiðis Kommuna** |
|---|---|
| FO-740 Hvannasund | FO-750 Viðareiði |
| Tlf. +298 452007 | Tlf. +298 451083 |
| Fax +298 452007 | Fax +298 451094 |
| t-post: hvanna@olivant.post.fo | vid.kommuna-kallnet.fo |

Dagrøktarskipanin á Viðareiði hevur 7 ár á baki, og er í dag nominerað til 30 børn, 6 dagrøktarar eru í skipanini. Skipanin hevur eina spælistovu við spæliøki rundanum, har dagrøktarar og børn kunnu koma saman.

Skipanin í Hvannasunds Kommunu er nominerað til 30 børn. 5 dagrøktarar eru í skipanini. Skipanin í Hvannasundi hevur nýggja spælistovu við øki rundanum til frama fyri dagrøktarar og børnini í skipanini.

# Tórshavnar Ítróttarráð

**Úrslit av drátti 3. august 2004**

Hesir seðlar hava vunnið:

| | |
|---|---|
| Vinningur nr. 1: | 18966 |
| Vinningur nr. 2: | 17042 |
| Vinningur nr. 3: | 6104 |
| Vinningur nr. 4: | 9058 |
| Vinningur nr. 5: | 10406 |
| Vinningur nr. 6: | 13651 |
| Vinningur nr. 7: | 20941 |
| Vinningur nr. 8: | 19902 |

**Vinnarnir vera bidnir um at seta seg í samband við Kristiannu á tlf.: 227717**

# DREAMBOX



**Besti fylgisveinamóttakarin á marknaðinum.**

**Kann eisini brúkast sum spælimaskina ella jukebox, og kann setast til internetið.**

Fyri einans
**3.995,-**




W W W . S K Y . F O

# Bygningur í miðbýnum til leigu



Tygum kunnu seta tygum í samband við undirritaða á tlf. 317920 ella 313536.

**Høgni Lützen**
**P/F Valdemar Lützen**